## VIÐMERKINGAR

# Viðvíkjandi sáttmálaásetingunum millum Starsvmannafelagið og Fíggjarmálaráðið

**Gunnleivur Dalsgarð, formaður, f.v.**

Starvsmannafelagið hevur sent Jóannesi Eidesgaard, løgmanni soljóðandi bræv:

Í okt. 2003 gjørdi Starvsmannafelagið nýggjan tvey ára sáttmála við Fíggjarmálaráðið, sum ásetir at lønin hækkaði við 2.9% 1. okt. 2003 og aftur við 2.9% 1. okt. 2004, og harumframt hækkaði eftirlønargjaldið við 1% um árið somu tíðarskeið.

Fyri at ongin ivi skuldi verða um avleiðingina av hesi áseting, gjørdu vit Fíggjarnevnd løgtingsins greitt í skrivi dagfest 15.04.2004, at vit roknaðu við sum givið, at játtanarmyndugleikin heldur seg til sáttmálaásetingarnar. Um iki, so fer hetta at hava við sær óneyðugar trupulleikar, tí talan vildi jú vera um sáttmálabrot og sáttmála, ið gjørdur varð undir følskum fortreytum.

Í opnum brævi í Dimmalætting 10. juni ger Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, púra greitt, at landsstýrið ikki ætlar at halda seg til sáttmálan, sum Starvsmannafelagið hevur gjørt við sama landsstýrið, og staðfestir, at játtanirnar til avtalaðu lønarbatarnar til landsins stovnar ikki kemur uppá tal og at hetta er ein politisk avgerð, sum samlaða landsstýrið hevur tikið. Fyri ordans skuld skulu vit eisini gera vart við, at talan er ikki bert um okkara sáttmálaøki, men allar sáttmálar innan almenna økið.

Vit eru skelkaði av, at landsins myndugleikar soleiðis ætla at fremja grovt álitis- og sáttmálabrot og fara at ávara landsstýrið um tær álvarsligur avleiðingarnar, sum koma at standast av slíkum grovum álopi !

Avrit av hesum skrivi er sent til Fíggjarmálaráðharran og Almannaráðharran, eins fjølmiðlar eru kunnaðir um skrivið.

# Miðflokkurin var við til at skerja blokkin!!

**Johan Petersen**



Hóast Miðflokkurin meir enn nakar annar tekur Jesuspápa til inntøku fyri sínum politikki, himprast hann ikki við at manipulera/lúgva.

Miðflokkurin tvíheldur um, at hann var ímóti blokkniðurskurðinum. Seinast førir Bill Justinussen hetta fram í bløðunum mikudagin.

Blokkniðurskurðurin orsakað av Yvirtøkulógini

Men hvør er so sannleikin? Jú, orsøkin til, at blokkurin varð skorin niður við 400 mió. kr., er yvirtøkulógin frá 2001. Henda lógin yvirtók fíggjarligu ábyrgdina av nøkrum av málunum og málsøkjunum á lista A (fólkaskúlin, læraraútbúgving, frítíðarundirvísing, handils-, tekniskir-, maskinmeistara- og maskinistskúlar og almenn forsorg). Kostnaðurin av hesum yvirtøkum var 366 mió. kr.

Ikki færri enn 5 ferðir verður í viðmerkingunum til lógaruppskotið víst á, at blokkurin fer at minka, um uppskotið verður viðtikið:
1. ferð: ... at taka yvir hesi mál og málsøki við atliti at lóggávuvaldi, heruppi í fíggjarvaldi ...

2. ferð: ... fer at hava avleiðingar fyri inntøkur á fíggjarlógini við tað, at heildarveitingarnar úr

Danmark verða lækkaðar samsvarandi yvirtøkunum.

3. ferð: ... Heildarveitingarnar lækka sostatt 356 mió. kr. ... (seinni broytt til 366 mió. kr.)

4. ferð: ... Oman fyri standandi metingar av fíggjarligu avleiðingunum eru sostatt at skilja sum ein lýsing av ...

5. ferð: ... Avleiðingar av uppskotinum: Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar fyri landið/landsmyndugleikar: Ja.

### Miðflokkurin tók undir

Í álitinum tekur Jenis av Rana undir við uppskotinum, men sigur m.a.:

... Miðflokkurin førdi fram, at vit ikki kundu loyva okkum, gjøgnum einvísa minkan av blokkinum ...

Heilsuverkið hevur neyvan í nýggjari tíð nakrantíð verið so órøkt og niðurundirkomið ... gomlu okkara liggja hjálparleys ... viðurskifti teirra brekaðu og sálarliga veiku eru katastrofal ... føroyska skúlaverkið er so illa umsitið, at tað meira og meira tykist fara í upploysing ... og vit kundu hildið á við dømum um eitt samfelag í órøkt ... Tí kenst tað fleirfalt løgið, at landsstýrið einvíst ætlar at byrja lækkan av heildarveitingini (blokkinum) ... Miðflokkurin metir hesa ætlan høpisleysa, serstakliga í tí vána støðu nógvir samfelagsbólkar búleikast undir. (Sitat endað).

### Jenis av Rana atkvøddi fyri

Men hvør atkvøðir fyri uppskotinum við 2. viðgerð 21.09.2001 og við 3. viðgerð 28.09.2001: jú, tað ger Jenis av Rana!!!!

Avgerðin um blokkniðurskurð er tikin við Yvirtøkulógini, og at Miðflokkurin við neyðugu fylgilógini hevur atkvøtt ímóti, er málinum púra óviðkomandi (í viðmerkingini til fylgilógina stendur: ... Hetta er beinleiðis úrslit av, at endaliga yvirtøkan ... varð framd ... (Yvirtøkulógin) ...(sitat endað)).

Kanst tú leypa á bláman og ikki blíva vátur? Tað kundi Móses, tá ið hann leiddi ísraelsfólk tvørtur um Reyðahavið, men Jenis? Nei!! Er Miðflokkurin totalt óseriøsur??

(Sí www.logting.fo > Tingmál > Løgtingstíðindi 1880-2002 > 2001 > Vanlig tingmál > 5.Uppskot til løgtingslóg um at taka yvir málini og málsøkini á lista A í heimastýrislógini (Yvirtøkulógin))




Vika 25, 2004
www.kaupthing.fo

# Nú kemur rentuhækkingin í USA

**MARKNAÐARRÁK**

Sum væntað fekk røðan frá stjóranum í amerikanska tjóðbankanum (FED), Alan Greenspan, og røður frá øðrum limum í FED stóra ávirkan á virðisbrævamarknaðirnar í farnu viku. Røðurnar góðu greiða ábending um, at FED fer at hækka leiðandi rentu teirra 30. juni. Væntandi verður rentan hækkað 0,25% í 1,25%. Ein lítil møguleiki er tó fyri einari størri hækking.

Greenspan og aðrir FED limir meta, at gerst amerikanski kjarnuprísvøksturin (hetta er prísvøksturin uttan orku og matvørur) hægri enn 2%, kunnu rentuhækkingarnar gerast ógvusligari enn áður væntað. Prísvøksturin verður dagførdur týsdagin tann 15. Eftir øllum at døma, eru FED limirnir nærum á einum máli um, at trupulleikin á arbeiðsmarknaðinum er um at vera loystur, og tískil er prísvøksturin nú veruliga komin í andglettin. Marknaðarsemja er um, at kjarnuprísvøksturin í mai verður 1,8% eins og í apríl.

Verður prísvøksturin hægri enn 1,8% týsdagin, fara marknaðirnir at tulka hetta sum, at FED fer at hækka rentuna meira enn 0,25%. 0,25% eru longu innroknaði í marknaðirnar. Tí vil ein øktur prísvøkstur føra við sær at eitt ávíst trýst á virðisbrævamarknaðirnar og dollarin fer at styrkjast.

Í farnu viku varð kunngjørt, at amerikanska SBC, ið er høvuðspartaeigari í donsku telefyritøkuni TDC, ynskir at selja í minsta lagi 30% av samlaðu partabrøvunum í TDC. Eftir kunngerðina lækkaði TDC 8,5%, men er síðani hækkað 4,5% aftur. Hóast tíðindini eru negativ júst nú, merkir sølan, at lættari verður hjá TDC at seta í verk langtíðar ætlanir. Útlit eru tískil fyri, at tíðindini, sum frálíður, gerast positiv. Eftir at prísvakstrartølini úr USA eru kunngjørd týsdagin tann 15., heldur Greenspan enn eina røðu. Saman við prísvakstrarkunngerðini kann røðan ávirka marknaðirnar, serliga um Greenspan gevur ábendingar um, at FED umhugsar at hækka rentuna meira enn 0,25%. Roknað verður við, at vikan verður óstøðug á virðisbrævamarknaðunum orsakað av sera týdningarmiklu tíðindunum sum verða kunngjørd.

Rentur

| | Renta | +/- %-stig |
|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% |
| 2 ára lánsbræv | 2,92% | 0,13% |
| 5 ára lánsbræv | 4,04% | 0,10% |
| 10 ára lánsbræv | 4,61% | 0,05% |

Partabrævavísitøl

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| KFX, Danmark | 259,0 | -0,6% |
| OMX, Svøríki | 681,9 | -1,6% |
| DJ Stoxx 50, Evropa | 2.706,0 | -0,3% |
| S&P 500, USA | 1.136,5 | -0,3% |

Íløgufeløg

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 103,92 | 0,0% |
| Evru Lánsbrøv | 164,52 | 0,0% |
| Norrøn Partabrøv | 78,38 | -0,6% |
| Altjóða Vøkstur | 64,76 | 2,8% |

Gjaldoyru

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 620,86 | 2,9% |
| EUR | 743,34 | 0,0% |
| GBP | 1.122,19 | 1,0% |
| NOK | 89,06 | -1,9% |

*Renta og kursir kl 10. í gjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*



## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Brennistøðin á Hjalla nýggjan leiðara




*Bárður Michelsen í Havn er frá 23. august 2004 at rokna settur sum leiðari á Kommunalu brennistøðini á Hjalla*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*

Frá 23. august 2004 at rokna er Bárður Michelsen í Havn settur sum leiðari á Kommunalu Brennistøðini á Hjalla.

Bárður er 30 ára gamal og útbúgvin maskinmeistari. Hann byrjaði sum aspirantur í Mærsk-flotanum í 1993 og tók maskinmeistaraprógv í desember 1998. Hann sigldi sum maskinmeistari hjá Mærsk til 2000.

Síðan 2001 hevur hann starvast á umhvørvisdeildini hjá Tórshavnar kommunu.

Leiðarin er fyribils settur í eitt ár. 17 umsóknir vóru til starvið.

Kommunala brennistøðin var tikin í nýtslu í 1987. Brenniorkan er 5 MW ella 2,0 til 2,5 tons um tíman. Árliga brenniorkan er um 16.000 tons. Rakstrartíðin er 8.000 tímar árliga.

Undir brennistøðina hoyrir eisini rottangaskipanin, slamsúgving, tyrvingarplássið í Húsahaganum og jarnmóttøkuplássið á Hjalla.

Tilsamans 22 fólk starvast á Kommunalu brennistøðini.

## 25 ára starvsdagur

Í dag hevur Jákup Sørensen starvast hjá elfelagnum SEV á Sundsverkinum í 25 ár sum maskinmeistari, seinastu árini sum 1. meistari.

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum,
at kæra kona og mamma okkara

**Marita Poulsen**
Tórshavn

andaðist 12. juni, 49 ára gomul.
Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju
mikudagin 16. juni kl. 14.00.

*Fyri tey avvarðandi*
**Jóhan, Rúni og Frida**

Tey, ið vilja minnast Maritu, kunnu lata eina peningagávu til felagið Javna, konto í peningastovnunum.

Fyri 25 árum síðan:

# Skipsføraraprógv í 1979



*Til prövtøkuna á Føroya Sjómansskúla í juni 1979 fingu 9 skipsførarar prógv. Teir vóru: Hallur H. Mohr, Fuglafjørður, Dánial Petur Hansen, Sandavágur, A. Pauli F. Johansen, Miðvágur, Bjarni Petersen, Kollafjørður, Finnbjørn Johansen, Sandavágur, Hans J. Joensen, Vágur, Hans Martin Ø. Andreasen, Kvívík, Niclas J. Hovsgarð, Hov, og Eyðun Samuelsen, Haldarsvík.*
*Kelda. Myndaárbókin, árið ið fór 1979*

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum,
at mín góði sonur, pápi og beiggi

**Olivar Vang**
ættaður úr Tórshavn, búsitandi í Silkeborg

andaðist 11. juni, 55 ára gamal.

Jarðarferðin verður mikudagin 16. juni
úr Allers List Kirke, Silkeborg.

*Fyri tey avvarðandi*
**Maria,Sam, Jórun, Steingrím, Oddfríð og Miriam**

## Dagurin

**15. juni. Valdemarsdagur**. Danski kongurin Valdemar Sigur vann í orrustuni við Reval í Estlandi 1219. Søgnin sigur, at tá illa stóð til, fell reyður dúkur við hvítum krossi niður av himni. 15. juni í 1912 varð kunngjørt, at hesin dagurin skuldi vera almennur danskur flaggdagur til minnis um sigurin við Reval.

Navnið Valdemar er eftir russiska Vladimir, ið merkir *mikil í sínum veldi.*

Dagurin eitur eisini **Vitus**, til minnis um ein 12 ára gamlan drong, sum saman við fleiri øðrum varð tikin av døgum í Róm umleið ár 300. Dagurin er annars merkisdagur í Noregs søgu. Á vitusarmessu ár 1184 vann Sverri úr Kirkjubø sigur í sjóbardaganum við Fimreiti í Sogn og gjørdist einakongur í Noregi.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum at
kæra kona mín, mamma, vermamma, systir, svigarinda,
mostir, fastir, ommu- og abbasystir okkara

**Olga Reinert**
ættað úr Sørvági, búsitandi í Havn

andaðist hósdagin 10. juni, 55 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju
týsdagin 15. juni kl. 14.00

*Fyri tey avvarðandi*
**Johnny, Høgni, Bjørn og Rógvi**

Tey, sum vilja minnast Olgu, kunnu ístaðin fyri at senda blómur ella krans, lata eina peningagávu á konto í Føroya Banka.